**Samandráttur av fundarsamtykt hjá Hvalbiar Kommunu tann 07. juli 2011**

Møtt: Otto West, Trygvi Midjord, Martin í Nesi, Niels O. Eyvindsson,
Rúni Thomsen og Niels J. Thomsen.
Herdis Jensen er burturstødd.

| | |
|---|---|
| **Mál 1:**<br>**Umsókn um stuðul til Hv. Sóknar Orkufelag.** | Til 1:<br>Samtykt varð at stuðla hesum við kr. 12.000,-. |
| **Mál 2:**<br>**Umsókn um stuðul til Suðuroyar Ítróttardepil.** | Til 2:<br>Samtykt varð at fáa meiri nágreiniligar upp-lýsingar um fígging v.m. |
| **Mál 3:**<br>**Samstarvsavtala um sosiala økið** | Til 3:<br>Samtykt at halda fram eitt ár aftrat við verandi sáttmála til 31.12.2012. |
| **Mál 4:**<br>**Skriv frá Hvalbiar skúla um hølisviðurskiftini.** | Til 4:<br>Samtykt varð, at alt arbeiðið viðv. skúlanum verður gjørt í samráð við skúlaleiðsluna. |
| **Mál 5:**<br>**Skriv frá borgara.** | Til 5:<br>Niðurstøða ikki almenn. |
| **Mál 6:**<br>**Hoyringsskriv frá Innlendismáláráðnum viðv. kommunalari umskipan.** | Til 6:<br>Samtykt at boða IMR frá, at hetta var ov stutt skotbrá at koma við viðmerkingum. Biðja um at útseta hoyringsfreistina. |
| **Mál 7:**<br>**Byggisamtyktin.** | Til 7:<br>Samtykt varð, at bygdarráðið kemur saman aftur at viðgera byggisamtyktina saman við Kára Thomsen, áðrenn hon verður løgd fram. |
| **Mál 8:**<br>**Umsóknir til reingerð av alm. WC í Hvalba.** | Til 8:<br>Meiriluti var fyri at seta Jacob Eysturberg í starvið. |

| | |
|---|---|
| **Mál 9:**<br>**Kunning/viðm. til umsókn frá Faroe Cod Farm um broyting av aliloyvi.** | Til 9:<br>Samtykt varð at viðmæla at loyvi verður givið til at ala síl. |
| **Mál 10:**<br>**Kunning um mál beind í nevnd síðani síðst.** | Til 10:<br>Tekn.nevnd: Umsókn um byggiloyvi til rætt norðuri á Vaðnum, Sandvík. |
| **Mál 11:**<br>**Málsviðgerð síðani síðsta fund.** | Til 11:<br>Samtykt varð at geva byggiloyvi til rætt. |